# Umsóknarskjal til heimatelefon



| Telefonnummar |
|---|
| |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **1. Bílegging fevnir um** | ☐ Stovning ☐ Flyting ☐ Terminal ☐ Faks ☐ Uppsøgn ☐ Nr. broyting | | | |
| **2. Kundaupplýsingar** íbindingarbústaður | Slag av kunda ☐ Privatkundi ☐ Vinnukundi ☐ Pf. ☐ Spf. ☐ Kf. ☐ Pr. ☐ Lf. Annað: | | | |
| | Fornavn/fyritøka | | Eftirnavn | |
| | Kundanummar | | Føðingardagur/vinnutal | |
| | Bústaður | | Postnummar | Bygd/býur |
| | Postrúm | Matrikkulnummar | | Faks |
| | Kontaktnummar/fartelefon | | Teldupostadressa | |
| | Fyrrverandi bústaður (Bert útfyllast, tá talan er um flyting) | | Annað hald, sum skal flytast við? | |
| **3. Brúkari** skal bert útfyllast, um brúkarin er annar enn kundin. | Navn/fyritøka | | Eftirnavn | |
| | Bústaður | | Teldupostadressa | |
| **4. Hald** | Heimatelefon | Heimatelefon ☐ Lítið | Heimatelefon ☐ Vanligt | Heimatelefon ☐ Stórt |
| **5. Eykatænastur** | ☐ Stovning av tænastum ☐ Niðurtøka av tænastum | | | |
| | Sperr við loynitali, uttanlands | Fast sperr við loynitali | Fast sperr, allar samrøður | Fast sperr uttanlands |
| | Stytt nummarval, nr. til viðm. ☐ Ja ☐ Nei | Vís nummar ☐ Ja ☐ Nei | Tín tíð | Niðurtøka, fast forval |
| | 3 vinir: Vinirnir geva 25, 20 ella 15% í avsláttri | Vinur 1 (25%) | Vinur 2 (20%) | Vinur 3 (15%) |
| | ☐ Dult nummar ☐ Ikki við í telefonbók ☐ Undirstriking í telefonbók ☐ Eykaupptøkur ☐ Undirupptøkur | | | |
| | Navn á upptøkum | | | |
| **6. Gildiskoma** | Ynskist sett í gildi: ____________ /____________ 20 ____________ | | Eg ynski at frætta frá FT, tá serlig tilboð eru: ☐ Ja ☐ Nei | |
| **7. Viðmerkingar** | | | | |
| **8. Váttan** | **Undirritaði váttar, at hesar upplýsingar eru rættar, at undirritaði er myndigur og gjørdur varur við galdandi viðskiftatreytir. Undirritaði bindir seg til kostnaðin, ið stendst av haldinum, og váttar somuleiðis, at eingin eftirstøða er til Føroya Tele.** | | | |
| | Dagfesting | Navn | | Undirskrift |
| **9. Føroya Tele fyllir út** innanhýsis skráseting | Dagfesting | Sølufólk | | |

# Vegleiðing til heimatelefon



## Almenn viðurskiftir

Hetta blaðið greiðir frá oyðublaðnum.

Viðvíðkjandi prísum verður víst til serligt prísblað ella til **www.ft.fo**. Er oyðublaðið ikki rætt fylt út, skilar Føroya Tele sær rætt til ikki at stovna haldið, fyrr enn neyðugu upplýsingarnar eru tøkar. Stovningin er bindandi, tá ið oyðublaðið er undirskrivað.

## Tænastur, ið eru við í haldinum

Haldið fevnir um møguleika fyri vanligum samrøðum. Við eru møguleikar fyri notering, veking, trípartasamrøðu,, parkering og boðtóna.

## Telefonnummar

Tú fært eitt telefonnummar frá Føroya Tele. Ynskir tú eitt ávíst telefonnummar, skal tað skrivast her:

## 2. Kundaupplýsingar

Kundin stendur fyri og hevur alla ábyrgdina av haldinum.

Er tað ein fyritøka/stovnur, sum skal hava haldið, skulu hesir teigar fyllast út við navni, bústaði, postnummari, bygd/býi, vinnutali, telefonnummari og kontaktpersóni. Flestøll vinnutøl eru at finna á www.gulu.fo. Tey kunnu eisini fáast við at venda sær til Taks á tel. 35 26 00

Er tað ein privatpersónur, sum skal hava haldið, skulu fornavn, eftirnavn og føðingardagur eisini skrivast. Um tú longu ert viðskiftafólk hjá Føroya Tele, skal kundanummarið eisini skrivast (stendur á telefonrokningini).

Flugubein skal setast í slag av kunda.

Ynskir tú eina eykaupptøku í telefonbókini, til dømis hjúnafelaga, verða navn og eftirnavn skrivað undir eykaupptøku

Hevur tú eina teldupostadressu, kann hendan verða skrivað, soleiðis at Føroya Tele kann senda tær dagført tilfar um tænastuna.

## 3. Brúkarin

Skal bert útfyllast, um brúkarin er annar enn kundin.

## 4. Hald

## 5. Eykatænastur

Veljast kann millum fýra sløg av sperrum:

**Sjálvvalt uttanlands sperr við loynitali:** Við loynitali kanst tú velja at sperra fyri samrøðum til útlond.

**Sjálvvalt fat sperr við loynitali:** Við loynitali kanst tú velja at sperra fyri øllum samrøðum.

**Fast sperr uttanlands:** Tænastan kann bert broytast, um nýtt oyðublað verður sent inn ella ringt verður til Førya Tele.

**Fast sperr allar samrøður:** Tænastan kann bert broytast, um nýtt oyðublað verður sent inn ella ringt verður til Førya Tele

**Víðaristilling:** Tú hevur tríggjar møguleikar:
Víðaristilling, um ikki svarar *61. Víðaristilling, um upptikið er *67.
Víðaristilling av øllum uppringingum *21.

Víðaristilling kostar einki at stovna. Tú rindar bert fyri víðaristillaðu samrøðuna.

**Vís nummar:** Fyri at síggja nummarið hjá tí, sum ringir, er tað neyðugt at hava tænastuna vís nummar.

**Fastur móttakari:** Tú kanst velja at hava ein fastan móttakara, hvørja ferð tú ringir. Sentralurin ringir sjálvvirkin til tað nummarið, sum er innlagt, tá hornið hevur verið av í 5 sekund. Tú rindar stovningar- og mánaðargjald.

**Stytt nummarval:** Tænastan gevur møguleika, við bert 2 siffrum, at lesa inn telefonnummur, sum ringjast kunnu til. Veljast kunnu upp til 90 nummur, ið skulu hava stytt nummarval. Tú rindar stovningar- og mánaðargjald. Nummurini skulu skrivast í viðmerkingar feltið. Tænastan er bert til heimatelefon.

**3 vinir:** Tænastan gevur tær møguleika at ringja bíligari til tíni 3 yndisnummur. Nummurini kunnu vera heimatelefon, fartelefonnummur ella uttanlandsnummur.

**Niðurtøka av føstum forvali:** Tá tú hevur fast forval, meinast tað við, at tú ert kundi hjá øðrum veitara. Niðurtøka av Fast forval merkir, at tú gerst kundi hjá Føroya Tele.

**Tín Tíð:** Tosa næstan óavmarkað við aðrar fastnettelefonir um kvøldi og í vikuskiftinum fyri fastan kostnað. Tað kostar einki at tekna seg til tænstuna. Tænastan er bert til heimatelefon.

**Dult nummar:** Tú verður ikki tikin við í telefonbókina ella á **www.nummar.fo**, nummarið verður ikki upplýst á Nummarkall og sæst ikki við „Vís nummar", tá ringt verður frá tí.

**Undirstriking í Telefonbók:** Navn títt verður undirstrikað í telefonbókini og á **www.nummar.fo**. Tú rindar eitt árligt gjald.

## 6. Gildiskoma

Føroya Tele skal hava oyðublaðið í minsta lagi tríggjar vikur, áðrenn stovningin ynskist sett í gildið.

Tú kanst taka støðu til, um tú vilt frætta frá Føroya Tele, tá serlig tilboð eru.

## 7. Viðmerkingar

Eru nakrar viðmerkingar, kunnu tær skrivast her.

## 8. Váttan

Galdandi viðskiftatreytirnar eru tøkar í Telebúðunum, í telefonbókini og á **www.ft.fo**.

Kundatænastan, Postsmoga 27, 110 Tórshavn • Tel 80 80 80 • Faks 32 10 91 • kundi@ft.fo • www.ft.fo